# Umsókn um læruplássgóðkenning

| | |
|---|---|
| Yrki og sergrein | **Fínstálsmiður í rustfríum tilfari** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn á fyritøku | | | |
| Bústaður | | Telefon | |
| V-tal | | T-postur | |

| | |
|---|---|
| Umsóknin fevnir um deild | |
| Dagligur leiðari | |
| Ábyrgdari av verkligu læruni hjá lærlingum | |
| Hevur virkið fleiri arbeiðsstaðir? | |

| | |
|---|---|
| Tal av starvsfólkum | |
| Yrkislærd í føstum fulltíðarstarvi sum fínstálsmiður í rustfríum tilfari | |
| Útlærdir fínstálsmiðir í rustfríum tilfari við meiri enn 3 ára starvsroyndum | |
| Hevur fyritøkan áður havt læruplássgóðkenning | |

***Gev gætur:***

*1. Skrásetingarskjal fyri skráseting í vinnuskránni skal leggjast við*

*2. Læru- ella sveinabræv hjá ábyrgdara av verkligu læruni hjá lærlingum skal leggjast við. Er eingin í føstum fulltíðarstarvi við hesi útbúgvingini, skal virkið gera viðmerking um hetta niðanfyri.*

| |
|---|
| Stutt lýsing av virkseminum hjá fyritøkuni, og tær vørur og tænastur sum fyritøkan veitir. Umframt hetta, møguligar aðrar viðkomandi upplýsingar í samband við umsókn um læruplássgóðkenning. |
| |

**Uppgávur, lærlingurin kemur at takast við**

Fyri at virkið kann góðkennast sum lærupláss til fínstálsmið í rustfríum tilfari, er neyðugt, at lærlingur arbeiðir við niðanfyristandandi virksemi.

Vinaliga útfyll yvirlitið niðanfyri, hvussu ofta fyritøkan arbeiðir við einstøku uppgávunum.

- Hugtakið "Javnan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum eru rutina hjá virkinum
- Hugtakið "Sjáldan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum verða gjørdar av virkinum, men sum ikki eru rutinuuppgávur
- Hugtakið "Ongantíð" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum als ikki verða gjørdar av virkinum

| **Virksemi, tilfar og arbeiðsfatan fyri verkligu læruni** | **Javnan** | **Sjáldan** | **Ongantíð** |
|---|---|---|---|
| 1. leggja til rættis og gera minni skap í plátuprofilum, rør- og stálprofilum í eini samlaðari framleiðslutilgongd, umvælingartilgongd og viðlíkahaldstilgongd, | | | |
| 2. leggja til rættis og gera einfaldar uppgávur við hondstýrdum og maskinellum arbeiðshættum, | | | |
| 3. gera tilskeringar og evna til rættarskurð, skráarskurð og heildarskurð í plátur, rør og tvørskurðir við atliti at galdandi standardum | | | |
| 4. fremja samlingar í eini framleiðsluætlan við atliti at galdandi standardum | | | |
| 5. montera og demontera lutir, maskinur og installatiónir | | | |
| 6. viðlíkahalda framleiðslutól | | | |
| 7. gera eftirlitsmátingar við atliti at givnum standardum | | | |
| 8. at yvirflatu og eftirviðgera metall og annað tilfar í eini framleiðslu- opg umvælingarstøðu við atliti at góðsku og galdandi standardum | | | |
| 9. leggja til rættis og gera samansettar framleiðslu uppgávur í rustfríðum stáli, til hetta hoyrir eisini CAD forritan og brúk av CNC stýrdum maskinum, | | | |
| 10. velja út og fremja egnaðar samankomingarhættir av rustfríum tilfari, | | | |
| 11. leggja til rættis og fremja samansetingar av forgreiningum og bukkingum í rørum í rustføstum stáli við atliti at galdandi standardum, og | | | |
| 12. velja út egnaðar eftirviðgerðir og fremja yvirflatu og eftirviðgerð av rustføstum stáltilfari við atliti at galdandi standardum. | | | |
| 13. at brúka KT í sambandi við dagligu arbeiðsuppgávurnar. Eitt nú at leita eftir viðkomandi tekniskum og fakligum upplýsingum. | | | |

Námsskipan fyri fínstáslmið í rustfríum tilfari ( fyrrverandi heitið rustfastur kleinsmiður)

Góðkenning av virki sum lærupláss verður latin fyri 5 ár í senn.

Viðgerðin av umsóknini um læruplássgóðkenning tekur støði í reglugerð um góðkenning av læruplássum, sum Yrkisnevndin samtykti 4. mai 2006. Partur av viðgerðini kann eisini vera ein sýnsmeting. Lógargrundarlag: Løgtingslóg nr 94 um yrkisútbúgvingar frá 1998

Umsóknin verður løgd fyri Yrkisnevndina, at taka støðu til. Í sínum metingum um virkið kann fáa góðkenning sum lærupláss, leggur Yrkisnevndin dent á:

1. at yrkislærd fólk er á staðnum, við samsvarandi útbúgving og minst 3 ára arbeiðsroyndum, kann standa fyri upplæringini
2. at virkið javnan fremur allar tær týdningarmestu arbeiðsuppgávurnar, sum hoyra til viðkomandi yrkisgrein
3. at virkið hevur ta útgerð, sum eru neyðug fyri at kunna útinna arbeiðsuppgávurnar smb. pkt. 2.
4. at virkið lýkur treytirnar um arbeiðsumhvørvi, sum eru ásettar í lógum og reglum um gott og trygt arbeiðs - umhvørvi.

Fyritøkan váttar við síni undirskrift, at givnu upplýsingarnar eru rættar og í samsvari við galdandi ásetingar á yrkisútbúgvingarøkinum og í viðkomandi útbúgvingarkunngerð
Virkið váttar samstundis, at tað er kunnugt við galdandi lóggávu á økinum og at tað er ført fyri at nøkta ásettu krøvini við atliti at upplæringini innan viðkomandi yrkisgrein.

_____________________________ ______________________________________

*Dagfesting* *Undirskrift virkisleiðarans*

Umsóknin skal sendast til: **yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo**

**Útbúgvingarkunngerðin, vísur á førleikamálini í kapittul 3:**

**§ 11**. Førleikarnir, ið næmingurin skal hava ognað sær við útbúgvingarlok, eru innan hesi øki:

1) Ástøði. Grundleggjandi ástøðilig vitan, sum styðjar undir verkligt arbeiði.
2) Tilfarslæra. Grundleggjandi vitan um ymisk sløg av stáli, rustfrítt stál, aluminium, kopar, bronsa, nylon o.a.
3) Amboð og maskinur. Holla vitan um hondamboð og maskinur.
4) Uppmerking. Máting, mátiamboð, uppmerking og góðskutrygging.
5) Tilskering og tilevning. Mekanisk og termisk skering, dreying og fresing, sveising og lodding o.a.
6) Keldur. At finna galdandi normar o.a. á skrift ella teldu.
7) Tekning. Faktekning við hond og við teldu.
8) Umhvørvi og persónlig trygd. Rudding og trygd eftir reglum. Fakligar reglur, brandhjálp og fyrstahjálp.
9) Skjalføring. Frágreiðing. Kundatænasta.
10) Verk. Grundleggjandi hegni sum breiður smiður

§ 15. Førleikarnir til **sergreinina rustfríur fínstálsmiður** eru hesir:

1) at leggja til rættis og gera minni skap í plátuprofilum, rørprofilum og stálprofilum í eini samlaðari framleiðslutilgongd, umvælingartilgongd og viðlíkahaldstilgongd,
2) at leggja til rættis og gera einfaldar uppgávur við hondstýrdum og maskinellum arbeiðshættum,
3) at gera tilskeringar, og evna til rættarskurð, skráarskurð og heildarskurð í plátur, rør og tvørskurðir til galdandi standardir,
4) at fremja samlingar í eini framleiðsluætlan við atliti at galdandi standardum,
5) at montera og demontera lutir, maskinur og installatiónir,
6) at viðlíkahalda framleiðslutól,
7) at gera eftirlitsmátingar við atliti til givnar standardir,
8) at leggja til rættis og gera samansettar framleiðslu uppgávur í rustfríðum stáli, til hetta hoyrir eisini CAD forritan og brúk av CNC stýrdum maskinum,
9) at velja út og fremja egnaðar arbeiðshættir til at skera og forma skurð í plátur, rør og tvørskurðir við atliti at galdandi standardum,
10) at velja út og fremja egnaðar samankomingarhættir av rustfríum tilfari,
11) at leggja til rættis og fremja samansetingar av forgreiningum og bukkingum í rørum í rustføstum stáli við atliti at galdandi standardum, og
12) at velja út egnaðar eftirviðgerðir og fremja yvirflatu og eftirviðgerð av rustføstum stáltilfari við atliti at galdandi standardum